## DAGSINS MEINING

# Drívið á við fólkaheilsuætlanini!

Landsstsýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur rættuliga sett heilsumál á dagsskránna. Sama gjørdi sjónvarpið í gjárkvøldið, har klassakammeratarnir, Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, Óli Breckmann, løgtingsmaður og Jákup Petersen, lækni, røddu um fólkaheilsuætlan landsstýrisins.

Hóast tað fleiri ferðir av vertinum varð lagt upp til, at fólkaheilsuætlanin er ein fremstifingur av ovasta politiska palli - og at slík politisk kravboð ikki eru tað rætta, so sló hetta kortini ikki ígjøgnum kjakið.

Vit kunnu sjálvandi hava ymsar meiningar um, hvussu eitt slíkt átak skal gerast. Men vit kunnu valla vera ósamd um, at hetta er eitt skilagott stig, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur tikið.

Vit kunnu kalla tað eitt stríð móti teimum sokallaðu vælferðarsjúkunum. Eitt stríð ímóti sjúkum, sum vit við okkara fría vilja kunnu bæsa - kunnu steðga! Hví so ikki gera tað? Og um tað er neyðugt við einum sparki av ovastu politisku rók, so hví ikki tað?

Vit kunnu t. d. taka roykingina. Formaðurin í fyribyrgingarráðnum varskógvaði her í blaðnum nú um dagarnar um, at málið í Visjón 2015 ætlanini á roykiøkinum var alt ov óambitiøst. Hann nevndi, at politiskt drál og politiskur ódugnaskapur innan roykifyribyrgingina kann koma at kosta 100 tals føroyingum lívið, tí at visjónin sigur, at í 2009 skal talið á roykjarum vera í mesta lagi 20%, og at sama tal í 2015 hæst skal vera 15%.

Vit kunnu koma við nógvum umberingum, men viðvíkjandi roykingini, so snýr tað seg bara um vilja. Og um ein politiskur fremstifingur kann verða við til at fremja henda vilja, so er tað eisini í lagi.

Óli Breckmann segði tað so væl, tá hann nevndi ymsu snildirnar at lokka løgtingið til at játta pening til ymisk endamál, at hetta fólkaheilsuætlan landsstýrisins var eitt *gott endamál*. Tað halda vit eisini, drívið á!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Borgarstjórin heldur seg ikki til lógirnar

**JÁKUP JACOBSEN,**
kommunustýrislimur í Kunoyar Kommunu



Gerðabókin: Undirritaði hevur í nógv ár havt illgruna um óreglusemi í Kunoyar Kommunu, og nú eftir at hava sitið í kommunustýrinum síðani 1 januar 2005, kann eg staðfesta at sjáldan kemur roykur av ongum brandi.

Eg sat eitt stutt skifti í kommununi í 2003 fyri John Damberg, ið tá var í farloyvi. Eg sat 9 mánaðir og kommunan hevði einans 4 fundir í hesi tíðini, og eg sá ongantíð gerðabókina.

Vit hava eina kommunustýrislóggávu, ið sigur: § 25. Borgarstjórin ansar eftir, at allar samtyktir á kommunustýrisfundi verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða lisin upp og undirskrivað av øllum teimum luttakandi kommunustýrislimunum. Eg var nýggjur innanfyri kommunuarbeiði tá, so eg gjørdi ikki meira við hetta tá, men legði mær hetta væl í geyma.

Tað eru 3 ár liðin síðani tá, og eg eri enn ikki sloppin at skriva undir gerðabókina fyri 2003. So í gerðabókini standa einans 4 undirskriftir, sjálvt um tað stendur, at Jákup Jacobsen var møttur fyri John Damberg. Tað hevur nevnliga verið soleiðis, at gerðabókin ikki hevur verið førd á kommunustýrisfundunum í Kunoyar kommunu. Hetta skeiðið byrjaði í januar 2005 og á fyrsta fundinum haltaði við gerðabókini. Tá eg spurdi, hvar gerðabókin var, tók Heini smílandi til, at gerðabókin var full. Við øðrum orðum, hevði hann onga gerðabók, tá skeiðið byrjaði.

Eg kundi bert staðfesta, at innan fyri hetta umráðið koyrdi borgarstjórin í sama spori hesum viðvíkjandi, eins og í 2003.

Í fundarskipanini hjá kommununi stendur millum annað í § 15: Tá ið ein fundur er lokin og gerðabókin er lisin upp, skal hon verða undirskrivað av øllum, sum hava verið á fundinum.

Eg gjørdi vart við hetta beinavegin, men tað gingu fleiri fundir, har borgarstjórin einans býtti ørk út. Síðani eg gjørdi vart við hetta, er hetta komið uppá sítt pláss. Nú verður gerðabókin førd og skriva á hvørjum fundi.

Rætturin tikin frá kommunustýrislimunum:

Ferð eftir ferð havi eg havt ynskir um, at fáa ymisk mál við á skránna, men hetta er sum at sletta vatn á gás. Borgarstjórin tekur tað burturúr, ið hann heldur vera best. Restina tekur hann ikki við, og tað liggur helst í einari skuffu. Aftur her tekur Heini og skúgvar tann rættin til viks, ið ein kommunustýrislimur hevur, og heldur seg ikki til lógina, sum millum annað sigur: Henda áseting er tengd at einum rætti hjá øllum kommunustýrislimum til at spyrja um øll viðurskifti og at krevja, at eitthvørt mál verður tikið við á fundarskránna til kommunustýrisfundir.

Kunoyar kommuna hevur eina fundarskipan og tað er ein fundarskipan, ið Heini O Heinesen sjálvur hevur góðtikið og undirskrivað. Í tí fundarskipanini § 5 stendur soleiðis at lesa: Um limur seinast 8 dagar framman undan regluligum kommunustýrisfundi skrivliga hevur biðið um at fáa viðgjørt eitt mál, setur borgarstjórin málið á skránna til komandi fund. Soleiðis hevur Heini skriva og undirskrivað, ið kom í gildi tann 1. juli 2001.

Innlit:

Í § 17 stendur soleiðis: Kommunustýrislimur hevur rætt at fáa skjalainnlit í málum, har tilfarið í endaligum skapi er til skjals í kommunualu fyrisitingini.

Aftur her hevur borgarstjórin skúgva til viks tann rættin, ið kommunustýrislimurin hevur.

Eg havi biði um innlit, men eg havi ikki fingið innlit í tað, ið eg havi biði um.

Øll mál skulu almannakunngerast:

Tá ein fundur hevur verið í kommununi, so skal hann kunngerast. Tað stendur soleiðis í lógini: § 27 stk 2: Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, skulu verða almannakunngjørd við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.

Hetta verður heldur ikki gjørt, so borgarin kann ikki fylgja við, hvat ið kommunan samtykkir á fundi. Hetta hevur borgarin krav uppá.

Tað mangla karmar á øllum økjum:

Kommunan rennur seg fastan ferð eftir ferð í samband við ymisk mál. Grundin til hetta er, at kommunan ikki hevur karmarnar í lagi. Vit kunnu bara taka bygdaplanin fyri Haraldssunds bygd. Hann finst ikki, men hyggur tú á heimasíðuna hjá Kunoyar kommunu: www.kunoy.fo, so síggja vit munin. Har sært tú alt økið yvir Kunoy, men hyggur tú undir Haraldssund sært tú, at heimasíðan er í gerð, og soleiðis hevur hetta staðið í fleiri ár.

Tað er nógv onnur mál, ið eg ætli mær at viðgerða í komandi framtíð. Grundin til at eg komið fram við hesum er, at hetta er mín skylda sum kommunustýrislimur, og at tað rætt at borgarin fær hetta at vita, men sannleikin er ofta illa lýddur.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.